

**FAKTA ERLING**

**Navn:** Erling Eysturoy
**Aldur:** 47
**Starv:** Sjálvstøðugur vinnurekandi
**Bústaður:** Havn
**Dólganavn:** Bjarti
**Besta dólgaminni:** Tá vit fóru til Vestmanna á løbihjóli.

Erling:
## Eg krimpaði tærnar, tá eg sá meg sjálvan í hasum leiklutinum. »Var eg so løgin?«

gjørdust so vælumtóktir. Á sosiala netverkinum Facebook er ein bólkur stovnaður, ið eitur »Dólgarnir aftur í SVF« og hevur í løtuni 3.158 limir.

**Hans Jacob:** Vit høvdu ikki ein tanka um, at tað skuldi verða annað enn ein jólasending. Men uppá onkran máta mugu vit hava rakt plett.

**Egi:** Eg haldi at orsøkin til, at tað gjørdist so vælumtókt er, at tað gongur so seint fyri seg. Børn fáa tíð at fantasera, tá tað ikki hendur so skjótt. Tey kunnu skapa sær sínar egnu myndir.

**Erling:** Vit vóru eisini í einum vælkendum umhvørvi, vanligum klæðum og gjørdu ting, ið børn kanska kenna seg aftur í.

**Egi:** Einaferð eg kom framvið FK í býnum í Havn, komu tveir smádreingir rennandi út. Teir steðgaðu frammanfyri mær og prátaðu um Dólgarnar. Ein av teimum kundi ikki rættuliga standa stillur og leyp avstað, meðan vit tosaðu. Tá rópti hin eftir honum »Ver ikki bangin – hesin dólgurin stjelur eisini«. Tá vísti tað seg, at teir høvdu stolið ein pakka av ballónum inni í FK.

**Erling:** Nei, vit vóru kanska ikki so pedagogiskir altíð.



### Noyddur at sløkkja

At Dólgarnir skuldu endursendast 21 ár aftaná, at seinasta inspælingin varð gjørd, var ikki nakað, ið teir tríggir væntaðu sær.

**Egi:** Eg hugdi eftir fyrsta partinum, men eg var noyddur at sløkkja. Tað er bara so píniligt, at tað gongur so seint fyri seg. Filmiskt er tað gysiligt.

**Hans Jacob:** Ja, eg hevði nokk gjørt tað betri, um eg hevði spælt tað inn nú.

**Erling:** Eg krimpaði tærnar, tá eg sá meg sjálvan í hasum leiklutinum. »Var eg so løgin?«

Erling, sum eisini er kendur frá filmunum um Trøllaommuna, sigur, at nú koma børn fram til hansara og siga »tað ber ikki til bæði at verða ein dólgur og Erling politistur«.

**Egi:** Tað hevur undrað meg, hvussu nógv fólk, sum gjøgnum øll hesi ár hava kent meg aftur sum dólgur.

**Hans Jacob:** Eg var uppi í Rit&Rák, áðrenn eg kom oman her, og har var ein heilur skúlaflokkur, sum steðgaði upp, tí tey kendu meg aftur.

**Erling:** Ja, strævið nú fara øll at kenna meg aftur ... nei, tvætl fyri tað mesta er tað stuttligt, tá børn koma og heilsa uppá.



### Ætla tit at gera nakað meir við Dólgarnar?

**Erling:** Nei, eg og Egi hava onkuntíð tosað um tað, men tað er ongantíð blivið til nakað og blívur tað neyvan.

**Egi:** Tað er eitt fínt fornemmilsi at fólk enn hava gleði av okkara gomlu Dólgum.

Hátíðarløtan er komin at enda. Teir tríggir siga farvæl og fara hvør sín veg. Eg siti eftir við kensluni at hava møtt mínum idolum og hevði allarhelst vilja koyrt teir til Leynar saman við Zacharias Hammer og noytt teir at spælt okkum nakrar partar afturat.

Heimkomin sita børnini frammanfyri skíggjanum og hyggja eftir Dólgunum. Eg gleðist yvir, at teir sleppa at læra hesar tríggjar menn at kenna og veit, at nógv túsund við mær kenna tað á sama hátt.